gult8 cyan8 magenta8 svart8

DAGSINS MEINING

Sharon og fortíðin

Er tað nakað mál, sum nógvir føroyingar hava eina avgjørda meining um, so er tað til Ísrael og støðuna í Miðeystri. Vit verja Ísrael og tað ísraelar standa fyri og gera tað fyri nærum einhvønn prís. Vit síggja arabarar og palestinar sum fíggindan, sum tann, ið er orsøkin til allar ólukkur. Soleiðis hevur tað altíð verið her á landi og í stórum parti av vesturheiminum. Men sohvørt sum miðlarnir eru mentir og útviklaðir og hava kunnað sett nógva orku til at fylgja tí, sum fyrigongur eitt nú í Miðeystri, so ber ikki til at lata eyguni aftur fyri, at eitt mál hevur oftast tvær síður.

Bretska sjónvarpsrásin BBC, sum nú hevur átt atgongd inn í nærum hvørt heim í Føroyum í nøkur ár, er ein av teimum miðlunum, sum hevur roynt at vísa okkum veruleikarnar frá tí nærum kríggsherjaða Ísrael. Hon hevur – eftir okkara tykki – roynt at lýsa hesa nærum óloysiligu støðu frá øllum síðum. Hóast tað so eru nógvir ísraelar og viðhaldsfólk teirra í øðrum londum, sum halda, at BBC og aðrar sjónvarpsrásir eitt nú CNN, reka antiísraelska propagandu, tvs. bara lýsa málið til fyrimunar fyri palestinar.

Tað hoyrdu vit so seint sum í hesi vikuni, tá umboð fyri ísraelsku stjórnina funnust harðliga at eini Panoramasending hjá BBC um leiklutin hjá forsætisráðharranum Sharon í hópmorðunum á palestinsk flóttarfólk í legunum Sabra og Shatilla í Libanon fyri nærum 20 árum síðani. BBC kemur sum so ikki til nakra niðurstøðu, men tað setir so mikið fokus á leiklutin hjá Sharon sum var verjumálaráðharri í Ísrael um tað mundið, at viðurkendir altjóða sakførar og dómarar meta tað vera rætt at fáa Sharon fyri ein altjóða dómstól við skuldsetingum um at hava verið við til at loyva falangistum í Libanon at gera tað skitna arbeiði: at beina fyri túsundtals ósekum palestinum.

Hetta eru harðar ákærur men als ikki nýggjar og ókendar. Tí eftir hópdrápini varð ein kanning sett í verk av málinum og Sharon varð noyddur til at fara frá sum verjumálaráðharri fyri sín »leiklut« í hesi hending. Í dag er málið vorðið kannað enn meira og nú meta høgtstandandi løgfrøðingar, at málið eigur at verða roynt við altjóða dómstól.

Hvat vit enn halda um ísraelar og palestinar, so eru vit øll samd um, at hetta er ein ólukkulig støða fyri bæði hesi fólk. Vit kunnu á ongan hátt taka undir við teimum morðum og atsóknum, sum báðir partar eru atvoldin til. Tí vildi tað verið rætt at latið ST-friðarherlið komið inn í myndina. Nú fáa vit so at síggja, hvat BBC-sendingin fer at útvikla seg til. Hvør veit, tað kunnu koma so avdúk-andi prógv fram, at Sharon enn einaferð verður noyddur at lata ein ráðharrasess frá sær.

Sosialurin

VIÐMERKING

Spell er tað!

Hensar Ellingsgaard
deildarstjóri

Formaður Føroya Lærarafelags sigur seg at halda fast um umberingina fyri Torbjørn Jacobsen, landsstýrismann, hóast Mentamálastýrið hevur gjørt vart við, at stovnurin kundi ikki biðja um umbering fyri landsstýrismannin. Tað var sagt við útvarpsmannin týsdagin 5. juni 2001 og á fundinum við leiðsluna í Vestmanna skúla hósdagin 7. juni 2001.

Fundurin við Vestmanna skúla, har umboð fyri Føroya Lærarafelag var bjóðað við, var havdur fyri at loysa eitt vandamál. Tað eydnaðist eisini. Álitisfólk Føroya Lærarafelags í Vestmanna skúla hevði eisini fingið fundarboð, men var bundið av sínum arbeiði í Vestmanna skúla og kundi tí ikki verða á fundi í Mentamálastýrinum. Formaður Føroya Lærarafelags, ið umboðaði felagið á fundinum, noyddist at fara av fundinum á annan fund, áðrenn fundurin við leiðsluna í Vestmanna skúla var liðugur.

Deildarstjórin legði dent á at hava góð viðurskifti við allar skúlar, eisini við Vestmanna skúla. Skúlastjórin í Vestmanna skúla segði seg altíð at hava havt góð viðurskifti við fólkini í Fólkaskúladeildini, og hann vónaði, at tað fór at eydnast at finna fram til eitt felags úrslit á fundinum. Tað ráddi um at koma á mál sama dag, av tí at fundur skuldi verða í lærararáði skúlans seinni sama dag. Leiðslan í Vestmanna skúla skilti, at tað var trupult at loysa málið í Vestmanna skúla til fulnar. Ein loysn var funnin, sum partarnir kundu góðtaka.

Sosialurin endar grein sína og sigur, at Føroya Lærarafelag fyribils skal verða hjástatt á øllum fundum millum umboð fyri føroyska fólkaskúlan og Mentamálastýrið. Tað verður her gjørt vart við, at Føroya Lærarafelag er ikki fyrisitingarmyndugleiki, og um so skuldi verið, noyddist felagið at flutt sín bústað á Hoyvíksveg 72, av tí at tað er dagligt samskifti av ymiskum slag millum føroyska fólkaskúlan og Mentamálastýrið. Tað tykist ikki at koma formanni felagsins í huga, at tað kann eisini bera á, at umboð fyri fólkaskúlan ikki vil hava Føroya Lærarafelag hjástatt á fundi við Mentamálastýrið.

Mentamálastýrið ætlar sær sjálvt at gera av, nær Føroya Lærarafelag skal verða umboðað á fundum við umboðum fyri føroyska fólkaskúlan.

Føroya Læraraskúli

Heri Mohr

Í heimastýrislógini frá 1948 er tilskilað, hvørji sermál (listi A), »verða flutt til føroyska heimastýrið ella seinni verða flutt til tess eftir ynski heimastýrisins ella ríkisstjórnarinnar.

Verandi landstýri hevur fráboðað, at arbeitt verður við at flyta tey skúlamál, sum enn eru á lista A, til heimastýrið.

Millum tey mál, sum ikki enn eru flutt til heimastýrið, er Føroya Læraraskúli.

Skúlin hevur tey mongu ár, hann hevur virkað, fingið neyðuga fígging beinleiðis frá »undervisningsministeriet« í Keypmannahavn, men frá 1. januar 1988 at rokna varð fíggingin beind í blokkin, sum er at finna undir § 20: Inntøkur í fíggjarløgtingslógini.

Í »Lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre på undervisningsområdet (Omlægning af statsrefusioner m.v. til bloktilskud«) frá 18., november 1987 er tilskilað:

»§ 1. Undervisningsministeriet yder árligt et tilskud til Færøernes hjemmestyre på 157.225.000 kr. (1987-prisniveau).

§ 2. Tilskuddet reguleres árligt med en procent, der fastsættes på finansloven.

Stk. 2. Undervisningsministeren kan efter forhandling med hjemmestyret og med Finansudvalgets tilslutning ændre tilskuddets størrelse, hvis der sker væsentlige ændringer i de forudsætninger, der har ligget til grund for til tilskuddets fastsættelse«.

Samsvarandi fylgiskjølum til nevndu lóg eigur Føroya Læraraskúli 8.237 mió. av játtanini til skúlaverkið uppá 157.225 mió., og við tí undir § 2 nevndu árligu regulering er læraraskúlans partur øktur til uml. 11 mió., sum hevur staðið óbroytt síðan 1998.

Skeita vit so í landskassans roknskapir 1998-2000 síggja vit, at læraraskúlin hevur fingið fylgjandi løgtingsjáttanir:

1998	11.8 mió.
1999	11.9 mió
2000	12.1 mió.
	35.8 mió.

Av hesum hevur blokkurin goldið (3 x 11 mió) ca 33.0 mió

Landskassin lagt út ca 2.8 mió.

Omanfyri nevndu § 2 in mente, og so tað sum nú alment er komið fram í okkara fjølmiðlum, gevur okkum orsøk til at spyrja:

1) Hevur landsstýrið haft samráðingar við »undervisningsministeriet« um at »ændre tilskuddets størrelse til Færøernes Seminarium«, av tí at »væsentlige ændringer« eru hendar síðan 1. januar 1988?

2) Hvørja lóg hava vit, sum gevur løgtinginum og tess fíggjarnevnd heimild til at játta donskum stovni, Føroya Læraraskúla, rakstrarpening havandi í huga, at játtanir til skúlan hava støði í blokkinum frá ríkiskassanum?

Dámligt hevði tað verið, um landsstýrismaðurin við skúlamálum kundi svarað upp á hesar fyri skattborgaran viðkomandi spurningar.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9

VIÐMERKING

Fullveldi framum alt!

Atli Hansen

So einfalt tykist henda samgongan at hugsa. Fullveldi og einki annað.

Tað var eisini at síggja til ein lotur landsstýrismaður við heilsu- og almannamálum, sum í sjónvarpinum mátti viðganga, at undir hesi samgonguni var einki røktarpláss komið afturat í Føroyum. Eftir eitt val við gyltum lyftum til tey sjúku og gomlu er snøgt sagt einki hent enn, nú vit hava lagt meira enn 3/4 av valskeiðinum aftur um bak.

Landsstýrismaðurin royndi at bjarga støðuni við at pynta seg við lántum fjaðrum. Hann segði seg og samgonguna hava fingið pláss til 19 íbúgvar á ellisog røktarheiminum í Sandoynni, men minnist meg rætt, so var hetta ein partur av tí sonevndu Sandoyarætlanini og hon varð framd av undanfarnu samgongu undir leiðslu av Sambandsflokkinum.

Hesa seinastu tíðina eru vit ferð eftir ferð mint á, hvussu illa tað stendur til innan okkara eldrarøkt og serliga á demensøkinum. Tað er tørvur á ómetaliga stórari fíggjarjáttan á hesum øki – bæði til íløgur og rakstur. Og her hendir einki.

Hóast gyltu lyftini frá valstríðnum, so hevur samgongan læst seg fastan til at gera minst møguligt við hesar trupulleikar. Strammir íløgurkarmar á tí almenna økinum forða fyri at nakað munagott verður gjørt.

Og búskaparpolitikkurin her í landinum er soleiðis, at absolut einki skal gerast og einki kann gerast, uttan at kollrenna búskapin. Vit fingu boðini frá Búskaparráðnum nú um dagarnar. Tað er nógv ferð á búskapinum, hann er heitur, men tað gongur sum er, sigur Búskaparráðið. Val at merkja um einki – absolut einki – verður sett í gongd innan almannaøki. Samgongan er eisini her fullkomuliga læst føst av, einki at hava gjørt fyri at justera búskapin ávegis, so man kann fara undir at bøta um tey vánaligu viðurskiftini hjá okkara sjúku og gomlu. Eingin førdur búskaparpolitikkur. Eingin stýring. Bert latið standa til og vóna tað besta.

Støðan á eldraøkinum er so grotesk vánalig, at hon má sigast at vera ein skomm fyri eitt framkomið samfelag við teimum fíggjarligu møguleikum, sum vit hava í Føroyum í dag. Men her verður helst illa húsast og sett av til luftkastellir í staðin. Tað er ringt at ímynda sær, hvussu vit fara at loysa hesar trupulleikar undir einum fullveldi við 40% skerdum fíggjarligum møguleikum. 40% minni til heilsu- og almannamál er ikki smápengar.

Og so vil formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Helena Dam á Neystabø, koma sínum landsstýrismanni til hjálpar við at skjóta upp at seta 200 mió. kr. meira av á fíggjarlógini fyri at loysa hesar trupulleikar. Nei, Helena, so lætt er tað ikki. Spyr bara Búskaparráðið. Tú mást eisini siga okkum, hvussu tú útvegar peningin ella hvørjum tú ætlar at taka hann frá.

Í undanfarna valskeiði stóð Sambandsflokkurin á odda fyri tí samgongu, sum fekk landið á rættkjøl aftur aftaná búskaparliga skrædlið. Búskapurin hevði í 1998 fótað sær so væl aftur, at Sambandsflokkurin upp til valið kundi boða frá, at um hann fekk mandat aftur, so var tað niðurslitnað samfelagið, sum skuldu umvælast og tey veiku í samfelagnum, sum skuldu lyftast til eitt virðiligt støði.

Flokkurin fekk tíverri ikki hesa álitisváttan. Nú eru so 3 ár farin við øðrum stýri og einki er hent – absolut einki. Um minni enn eitt ár verður val aftur og Sambandsflokkurin fer uttan iva at endurtaka síni lyftir frá seinasta vali, um at stríðast fyri betri korum fyri tey sjúku, tey gomlu, tey húsvillu – stutt sagt fyri øllum teimum veiku í samfelagnum. Sambandsflokkurin hevur altíð staðið við sína sosialu ábyrgd og er til reiðar aftur at vísa hetta í verki aftaná eitt komandi val.

Tað er í góðum tíðum við góðum inntøkum, vit skulu loysa tílíkar trupulleikar. Og hesar inntøkurnar hava vit nú. Í vánaligum tíðum verður tað ikki gjørt.

Og júst á hesum skulu vit kennast sum eitt vælferðarsamfelag og sum eitt fólk við ábyrgd og stoltleika – nevniliga hvussu vit fara við teimum, sum hava ilt við at klára seg sjálvi.

Gøtu 24.06.01

Oddagrein í Sosialinum hevur rætt, men ...

Óli Jacobsen

Hetta er ein lítil viðmerking til oddagrein í Sosialinum týsdagin. Í samband við ráfiskagrunnin verður sagt, at »Javnaðarflokkurin var við til at fáa kappingarpartin inn í skipanina..«, t.v.s. í ráfiskagrunnin. Tað er greitt, at greinskrivarin kennir til tað sum hendi á hesum økinum. Og tað er eisini púra rætt, sum sagt verður, men hetta er bert ikki allur sannleikin. Tí jást hetta málið er eitt gott dømi um hvussu nógv, ið kann fáast burtur úr samstarvi millum fakfeløg og politiskar myndugleikar og flokkar.

Hetta mál byrjaði í 1986, tá eg á fiskivinnutingi legði fram eitt fullfíggjað uppskot um eina nýggja prísáseting, har virkini í staðin fyri at fáa eina fastsetta upphædd pr.kg. í sín part skuldi fáa ein prosentpart av framleiðsluvirðinum. Hetta vildi givið virkjunum ein heilt annan áhuga fyri at fáa meira burturúr og at halda útreiðslunum niðri. Samstundis var ein ætlan um hvussu studningurin úr ráfiskagrunninum kundi minkast niður í einki eftir fáum árum.

Hesi hugskot vaktu slíkan ans, at Atli Dam, sum tá hevði ábyrgdina av fiskivinnuni, setti eina nevnd at arbeiða viðari við hesum hugskotum. Av ymiskum orsøkum var hetta arbeiðið ikki komið víðari í 1988, tá val skuldi vera. Tí var eg sjálvur við til at evna tað uppskot, sum varð lagt fram á ting beint áðrenn freistina at leggja fram uppskot í seinastu tingsetuni hetta valskeiðið. Tað er hetta uppskotið, sum eisini varð samtykt, sum vístverður til í umrøddu oddagrein.

Av ymiskum orsøkum tók tað sína tíð at fáa sett nýggju skipanina í verk. Ein var, at vit í 1988 høvdu størstu marknaðarkreppu í nýggjari tíð. Ein onnur var, at tað tók sína tíð at sannføra virkini um, at marknaðarbúskapur var verdur at royna! Men alment byrjaði hesin marknaðarbúskapur ársskiftið 1989/90. Og í somu viku byrjaði kappingin millum virkini um fiskin við tí ársliti, sum vit kenna so væl.

Hvussu forbeinað tann politiska skipanin var sæst eisini av, at á sumri 1991 samtykti tingið at innføra ta gomlu koddaskipanina aftur, har virkini vóru tryggjað í høvd og reyv uttan mun til inntøkur og útreiðslur. Orsøkin til, at henda skipanin ikki kom at virka var, at feløgini hjá fiskimonnum noktaðu av velja limir í eina nýggja prísásetingarnevnd, hvørs høvuðsprinsipp longu høvdu spælt fallitt.

Men við so glæsiligum úrsliti av samstarvi millum javnaðarflokkin og fiskimannafelagið skuldi ein hildið, at flokkurin var meira enn íðin at halda áfram. Men søgan vísti tað beint mótsatta, uttan at hetta skal útgreinast nærri á hesum sinni.

Seinasta royndin hjá fiskimannafelagnum av javnaðarflokkin er tá hesin í samband við málið um fiskidagaskipanina bæði skjeyt upp og atkvøddi fyri, at bert reiðarafeløg skuldi vera umboðað í hesi nevnd. Í viðmerkingunum til lógina frátók javnaðarflokkurin enntá fiskimannafelagnum tess eksistens í einum máli, har tað hevur somu áhugamál sum reiðarar. Tað er einki frætt um, at tað á nakran hátt nervar javnaðarflokkin, at hann á hendan hátt hevur framt rættarbrot, greinsandi til grundlógarbrot, móti tí felagi og formanni, sum flokkurin kann takka fyri, at umrøddu petti í oddagreinini yvirhøvur kann skrivast.

Læraraskúlin – ein góður og mennandi skúli

Bjørg Djurhuus,
Eyðgunn Hansen,
Jón Højsted,
Sigrið Højsted

Eftir ringu umtaluna um Læraraskúlan í fjølmiðlunum í seinastuni vilja vit fegin gera nakrar viðmerkingar.

Vit eru fyrrverandi næmingar á skúlanum og tóku prógv haðani sum lærarar fyri ávikavist einum og tveimum árum síðan. Vit kunnu tessvegna ikki taka støðu til núverandi trupulleikar; tó kenna vit aftur hesa ónøgd frá nógvum av næmingunum, ið gingu á skúlanum tá eisini.

Vit vilja fegin gera greitt, at vit høvdu fýra góð og lærurík ár úti á Frælsinum, og at vit vóru væl nøgd við leiðsluna á skúlanum. Ikki minst var tað Paula Nielsen, rektara, fyri at takka, at vit trivust og mentust væl hesi árini. Hann var tann, ið sera sjónliga gekk á odda fyri tí positiva og frælsa anda, sum alla tíðina valdaði á skúlanum. Eisini var hann altíð fúsur at hjálpa til, tá ið heitt varð á hann at greiða onkran trupulleika, ið vit høvdu við lestrinum.

Tað er púra skeivt at seta nakað spurnartekin við hansara fakliga førleika, tí fáur hevði verið betur skikkaður til hetta starv eftir okkara tykki. Hvussu skúlin hevur verið rikin fíggjarliga, kunnu vit ikki taka støðu til, men bert viðmerkja, at tey árini, ið vit gingu á skúlanum, var ikki sjónligt, at skúlin hevði ov nógvan pening um hendi, heldur tvørturímóti.

Pauli eggjaði øllum næmingum til at vera við til at mynda teirra egna skúla og á tann hátt at taka medábyrgd av egnari læru. Eftir okkara tykki varð hetta tíverri misskilt av nógvum næmingum, soleiðis at tað frælsi og tann ávirkan, ið áttu at verið so mennandi bæði persónliga og fyri felagsskapin, í staðin vórðu køvd av illum tungum, ið vildu vera við, at her var talan um leiðslu, ið vildi sleppa sær undan arbeiði og ábyrgd. Fört varð fram tá eins og nú, at leiðslan var ódugnalig og bert elvdi til kaos á skúlanum.

Spurningurin er, hvønn skúla vit vilja hava. Er tað ein skúli við harðrendari leiðslu, ið altíð hevur avgerandi orðið, ella eini demokratiskari leiðslu, sum tekur øll - bæði lærarar og næmingar við upp á ráð. Leiðslan á Læraraskúlanum hevur tilvitað valt henda seinna møguleikan, men tey eru mong, ið heldur vildu havt, at hin fyrri leiðsluháttturin varð settur í verk á Læraraskúlanum. Men tá høvdu vit fingið ein heilt annan skúla og aðrar næmingar burturúr – eingin ivi um tað.

– Og tað hevði helst ikki verið í tráð við andan í teirri nýggju fólkaskúlalógini, ið júst hevur virðini frælsi, fólkaræði, tollyndi, sjálvstøðuga støðutakan og ikki minst tað at duga at síggja virðini í felagsskapinum sum aðalmál.